Lesið Sosialin so eru tit við

KRINGVARP FØROYA

# Fíggjar- og umsitingarleiðari

Fíggjar- og umsitingarleiðarin í Kringvarpi Føroya hevur avgjørt at royna nýggjar avbjóðingar, og tí verður starvið lýst leyst at søkja.

## Starvið

Sum fíggjar- og umsitingarleiðari stendur tú á odda fyri umsitingini hjá kringvarpinum. Tíggju fólk starvast á deildini, sum hevur ábyrgdina av bókhaldi og fíggjarstýring, avgreiðsluni, innkrevjing av kringvarpsgjaldi, umsiting av spølum, lýsingum og øðrum inntøkugevandi virksemi, starvsfólkamálum og sáttmálum um rættindi v.m. Fíggjar- og umsitingarleiðarin er skrivari í leiðslubólkinum.

## Tínir førleikar

Vit søkja eftir einum leiðara, sum hevur relevanta útbúgving og hóskandi royndir innan umsiting. Vit leggja dent á, at viðkomandi dugir væl at leiða og at skapa eldhuga hjá starvsfólkinum gjøgnum góð samstarvsevni, at fylgja settum málum og støðugt at taka við nýggjum avbjóðingum. Somuleiðis verður dentur lagdur á góð evnir at orða seg munnliga og skrivliga.

## Nærri upplýsingar

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jógvan Jespersen, stjóra.

## Vit kunnu bjóða

Eitt avbjóðandi og spennandi starv, sum gevur tær møguleikar fyri persónligari og fakligari menning. Kringvarpið er framvegis undir uppbygging og menning eftir samanlegging av útvarpi og sjónvarpi, og eisini komandi tíðin verður merkt av broytingum.

## Setanartreytir

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

## Umsóknir

Umsóknir skulu vera Kringvarpi Føroya í hendi í seinasta lagi 22. januar 2007.

Kringvarp Føroya Norðari Ringvegur Postboks 1299 FO-110 Tórshavn Tel.: + 298 34 75 00 Faks: + 298 34 75 01 www.kringvarp.fo

REPROZ

# Skrivstovufólk til Pf. Eyðun Jespersen

Søkt verður eftir einum skrivstovufólki, at byrja skjótast gjørligt.



**Starvið**
Starvið fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði, herundir bókhald, lønir, telefon, tolling v.m. Talan er um eitt starv við niðursettari tíð áleið 20 - 30 tímar um vikuna eftir nærri avtalu. Um tað er neyðugt má umsøkjarin kunnu arbeiða meira. Talan er um eitt áhugavert og sjálvstøðugt arbeiði.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Harumframt er tað ein fyrimunir um tú:
· Kanst arbeiða sjálvstøðugt.
· Hevur góð samstarvsevni.
· Ert álítandi og tekur ábyrgd av tínum arbeiði.
· Ert arbeiðssamur, røkin og fyrikomandi.

**Vit bjóða**
tær eitt fjølbroytt og áhugavert arbeiði innan skrivstovuyrkið. Pf. Eyðun Jespersen hevur 10 fólk í starvi sum er, og kemur tú at taka tær av alskyns uppgávum og fær harvið gott innlit í nógv viðurskifti.

Virksemið hjá Pf. Eyðun Jespersen er fjøllbroytt innan handil, handverk og ídnað. Tað umfatar m.a. ein elektromekaniskan verkstað, góðkendar kølimontørar og elinnleggjara, sølu av útgerð og tænastum til alivinnuna og sølu av ymiskum el-tilfari.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiðspláss í menning.Vit hava eitt gott arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið. Harumframt eru góðir skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikar. Løn eftir nærri avtalu.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Hjalmar Jacobsen (hj@lm.fo) ella Leiv Holm (lh@lm.fo) á telefon 35 12 20.

**Umsókn**
saman við avritum av próvskjølum og upplýsingum um arbeiðsroyndir, útbúgving v.m. skulu vera P/F Eyðun Jespersen, Stiðjagøta 4, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 19. januar 2006.

P/F EYÐUN JESPERSEN

Pf. Eyðun Jespersen Stiðjagøta 4 FO-100 Tórshavn